Ítróttar
Sosialurin
Nr. 98 • týsdagur • 23. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyar taptu allar dystirnar

**Tað gekk einki serligt hjá føroyska kvinnulandsliðnum í flogbólti, sum var við í EM-undankapping í Íslandi um vikuskiftið. Føroyar spældu tríggjar dystir og taptu allar. Men tað var tó ein lítil sigur at fegnast um**



*Tað gekst ikki eftir vild hjá føroysku flogbóltskvinnunum, sum taptu allar dystirnar í EM-undankappingini*

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fýra lond vóru við í undankappingini í Íslandi, sum kundi geva pláss í C-EM endaspælinum í kvinnuflogbólti.

Umframt Føroyar, vóru eisini Ísland, Kypros og Skotland við í kappingini. Undan fráferðini vóru vónir um at vinna onkran dyst, og um føroyska liðið veruliga rakti formin, kundi tað blíva til meira enn ein sigur.

Men tað gekk ikki rættiliga eftir vild hjá føroyska liðnum, sum tapti allar tríggjar dystirnar.

Fyrsti dysturin var ímóti Kypros fríggjadagin, og hann endaði við 3-1 sigri til Kypros. Bert í tí eina settinum koma føroyska liðið rættiliga í nánd og á hædd við tað kyprotiska liðið. Tað var í triðja setti, tá ið Føroyar vunnu 25-19, men so kom Kypros fyri seg aftur og vann fjórða settið heili 25-11.

### Ísland hevði munin

Leygadagin spældu Føroyar ímóti Íslandi, og her endaði eisini við 3-1 tapi hjá føroyska liðnum.

Á Íslendska landsliðnum eru millum annað tveir russiskir leikarar, sum hava stóran týding fyri liðið, og er hetta sæmbært serreglur sum eru í sambandi við hesar C-EM undankappingar. Føroyska liðið hevur bert føroyskar leikara við.

Hóast góðar vónir um at vinna dystin móti íslendsku vertunum og harvið fáa annaðplássið í bólkinum, so eydnaðist hetta ikki føroysku kvinnunum, tá tær í dag taptu 3-1.

Í fyrsta og triðja setti var veruligt skrædl: 11-25 og 10-25. Annað sett vunnu Føroyar 26-24, og tað fjórða endaði 25-20 til Ísland. Einir 120 áskoðarar vóru til dystin, sum vardi í 92 minuttir.

### Taptu triðja pláss

Hóast Føroyar høvdu tapt teir báðar undanfarnu dystinar fyri Kypros og Skotlandi, so ætlaðu føroysku kvinnurnar so avgjørt at vinna dystin um 3. plássið móti Skotlandi.

Ikki minst vóru vónirnar góðar, tí Føroyar høvdu vunnið sett móti bæði Kypros og Íslandi, meðan Skotland hevði tapt báðar sínar dystir 3-0.

Men tað gekk ikki. Føroyar taptu dystin 3-0, hóast sera lítil munur var á liðunum. Skotland vann bæði tey fyrstu settini 26-24. Í triðja setti fingu føroyar eina sera ringa byrjan og vóru aftanfyri við eini 10 stigum men bardu seg tó innaftur í dystin móti endanum á settinum. Skaðin var tó vorðin so stórur, og settið stóð ikki til at bjarga, og tær skotsku vunnu settið 25-20.

Í dystinum um 1. plássið vann Ísland 3-2 á Kypros, eftir at Kypros hevði vunnið tey bæði fyrstu settini.

### Okkurt at fegnast um

Um ikki úrslitini vóru tey bestu í Íslandi, so fekk føroyska liðið tó ein lítlan sigur á ferðini. Hetta var, tá bestu leikararnir á ymsu plássunum skuldi kjósast. Á samkomu í íslendska høvuðsstaðnum Reykjavík, gjørdist tað Karin Mikkelsen úr SÍ, sum var kosin besti móttøkuleikari í kappingini.

Og hetta er ikki fyrsti sigurin hjá Karini í ár, tí á gallveitslu herfyri var hon eisini kosin sum besti áleypari og ársins leikari í kappingini í vetur.

Næsta stóra málið hjá kvinnulandsliðnum verða nú Oyggjaleikirnir á Rhodos summarið 2007.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!